SPEKT | løggildir grannskoðarar

# Frágreiðing um gjøgnumskygni

## fyri roknskaparárið 2019/20

Frágreiðingin um gjøgnumskygni er almannakunngjørd á heimasíðu felagsins, www.spekt.fo, 30. september 2020

# Frágreiðing fyri 2019/20 um gjøgnumskygni

Sum ásett í §25 í Grannskoðaralógini hevur SPEKT, skrásetingarnr. 2732, gjørt hesa frágreiðing um gjøgnumskygni fyri 2019/20.

## Løgfrøðilig skipan og ognarviðurskifti

SPEKT er skipað sum eitt smápartafelag, sum fult út er átt av 3 løggildum grannskoðarum gjøgnum 3 smápartafeløg.

## Leiðsluskipan

Leiðslan í SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f er sett saman av nevnd og stjórn.

Í nevndini eru:
Finnbjørn Zachariasen, statsaut. revisor, formaður,
Mirjam Haraldsen, statsaut. revisor, og
Jóhannes Færø, statsaut. revisor

Í stjórnini er:
Mirjam Haraldsen, statsaut. revisor

## Luttøka í netverkum

SPEKT luttekur ikki í nøkrum netverki.

## Grundarlag fyri samsýningini hjá partnarunum

Í roknskaparárinum 2019/20 hevði felagið 3 partnarar. Allir partnararnir sita í nevnd felagsins umframt at ein av partnarunum er stjóri. Samsýningin til partnararnar fevnir lutvíst um eina fasta løn og lutvíst um part av yvirskoti felagsins í mun til ognarpart.

## Lýsing av innanhýsis góðskustýringsskipanini hjá SPEKT, haruppií ein tilskilan av politikkinum fyri ávikavist óheftni og eftirútbúgving

SPEKT er, eins og øll onnur grannskoðanarvirki, undirlagt ásetingum hesum viðvíkjandi í lóggávu, etiskum reglum og altjóða grannskoðanarstandardum, sum treytaleyst skulu fylgjast.

Leiðslan hevur ábyrgdina av, at felagið altíð hevur eina dagførda góðskustýringsskipan, og at skipanin verður fylgd, tá ið arbeiðsuppgávur verða loystar.

Teir einstøku løggildu grannskoðararnir hava skyldu til at nýta góðskustýringsskipanina – og øll starvsfólk hava skyldu til at upplýsa um funnar feilir og veikleikar í góðskustýrings-skipanini.

Øll góðskustýringsskipanin verður gjøgnumgingin og eftirmett einaferð um árið.

Góðskustýringin fer fram undir allari arbeiðsgongdini:

- Við leiðbeining og eftirliti líka frá planlegging til niðurstøða verður gjørd, ansa tann løggildi grannskoðarin og royndu starvsfólkini eftir, at uppgávan verður loyst í tráð við góðskustýringsskipanina
- Hvørt ár verða nakrar loystar uppgávur gjøgnumgingnar, fyri at eftirkanna um góðskustýringsskipanin er hildin og fyri at tryggja, at givnar váttanir eru í lagi
- Tað almenna Grannskoðanareftirlitið ger tilsvarandi eftirlit minst 3. hvørt ár
- Við grannskoðan av børsskrásettum feløgum og við loysn av uppgávum við serligum váða verður arbeiðið gjøgnumgingið av einum løggildum grannskoðara, ið ikki hevur luttikið í arbeiðinum, og sum ikki er knýttur at kundanum. Gjøgnumgongdin verður gjørd, áðrenn váttan verður givin

Í sambandi við hvørja einstaka arbeiðsuppgávu skal skjalprógvast/váttast, at lógar- og innanhýsis reglurnar um óheftni eru fylgdar og verður hetta eftirkannað í sambandi við eftirfylgjandi góðskueftirlitið. Harumframt skal hvørt starvsfólk einaferð um árið vátta yvirfyri SPEKT, at tey kenna til og hava hildið reglurnar um óheftni.

Viðvíkjandi kundum, sum eru fevndir av §19, stk. 3 í grannskoðaralógini verður ansað eftir, at lógarkravið um at skifta undirskrivandi grannskoðaran hvørt 7. ár verður fylgt.
Øll starvsfólk hjá SPEKT luttaka í hóskandi mun í undirvísing og eftirútbúgving. Ansað verður eftir, at løggildir grannskoðarar yvirhalda lógarásettu krøvini um eftirútbúgving, sum í løtuni eru 120 tímar yvir 3 ár.

Harumframt verður ansað eftir, KT-grannskoðarar og grannskoðarar, ið eru góðkendir av Fíggjareftirlitinum til grannskoðan av peningastovnum, lúka kravið um nærri ásett tímatal í eftirútbúgving á hesum serstøku økjunum.

## Seinasta góðskueftirlitið hjá Grannskoðanareftirlitinum

SPEKT hevur seinast havt alment góðskueftirlit í september 2020.

## Váttan um góðskustýringsskipanina og politikkin um óheftni

Leiðslan er av teirri fatan, at góðskustýringsskipanin virkar á fullgóðan hátt, og at ásetingarnar viðvíkjandi óheftni verða hildnar.

Mannagongdir og eftirlit minka um vandan fyri, at feilir kunnu henda, men kunnu ikki útihýsa vandanum fyri feilum. Í sambandi við góðskueftirlit felagsins hava vit ikki staðfest týðandi veikleikar hesum viðvíkjandi.

Tórshavn, hin 30. september 2020

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Stjórn:

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Finnbjørn Zachariasen, formaður<br>*statsaut. revisor* | Jóhannes Færø<br>*statsaut. revisor* | Mirjam Haraldsen<br>*statsaut. revisor* |

## Roknskaparupplýsingar

Í roknskaparárinum 2019/20 er prosentvísa býtið av staðfestu søluni hjá SPEKT hetta:

| | |
|---|---|
| Grannskoðan av roknskapum | 60% |
| Aðrar váttanaruppgávur við trygd | 2% |
| Skattaráðgeving | 6% |
| Aðrar veitingar | 32% |
| Til samans | 100% |

## Yvirlit yvir kundar fevndir av grein §19, stk. 3

Yvirlit yvir kundar, sum í roknskaparárinum 2019/20 eru fevndir av §19, stk. 3 í grannskoðaralógini, og sum SPEKT hevur loyst uppgávur fyri í undanfarna ári, har váttan við vissu er givin:

*Virkir, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum*

- Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags